# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Bilradio á Rás2** **hósdagin kl. 16.05**
*Í sendingini er samrøða við formannin í klubbinum Erik Fey, Heðin Mortensen borgarstjóra, Peter Holm stjóra í Smyril Line, og Johannes Jensen, stjóra á Hotel Føroyum, umframt Morgan eigarar og Sofus Hansen bilbyggjara.*




# Smáir bilar í stórum stíli

**Morgan bilarnir hava veruliga vakt ans kring landið í hesum døgum. Allarhelst er hetta fyrstu ferð at Morgan bilar hava verið í Føroyum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Sum tey flestu hava lagt til merkis, hava vit í løtuni vitjan av nøkrum heilt serligum bilum.

Eitt ferðalag við yvir 40 fólkum eru komin higar við 22 Morgan sportbilum.



*Heðin Mortensen, borgmeistari, handar formanninum í Morgan-klubbinum, Erik Fey, gávur frá Tórshavnar býráð. Millum teir er Jan Andersson frá Grafiska Verkstaðnum*

Morgan bilarnir hava vakt ans, har teir eru komnir kring landið. Ferðalagið fer avstað aftur við Norrönu hóskvøldið 17. september.



*Sofus Hansen var ein av teimum vitjandi á Skálatrøð*

Tað eru limir í danska bilklubbinum Morgan Sports Car Denmark, sum eru komnir higar at hátíðarhalda 100 ára stovningardagin hjá ensku Morgan bilverksmiðjuni. Ferðalagið kom við Norrönu mánadagin 14. september.

Á eini samkomu á Grafiska Verkstaði Føroya á Skálatrøð helt Heðin Mortensen, borgmeistari, talu fyri Morgan-fólkunum og ynsktu teimum vælkomin til høvuðstaðin og til Føroyar. Morgan verksmiðjan í Malvern í Onglandi og Tórshavnar kommuna eru bæði stovnað í 1909.

Morgan eru smáir lágir sportbilar við stórum motorum. Teir flestu hava V8 motorar við heilt upp til 250 hk.

Ferðaleiðari á túrinum er Erik Fey, sum sjálvur hevur ein Morgan frá 1979. Erik hevur ferðast nógv í Føroyum sum ferðaleiðari og hevur skrivað bøkur um føroyska list.



*Stórur áhugi var fyri hesum heilt serligu bilunum við stórum V8 motorum*